## Ynskja kvinnur í Landsstýrið

Demokratia og Javnstøðunevndin heita á eina nýggja samgongu um at arbeiða fyri einum jøvnum kynsbýti í landsstýrinum. Áheitan. Hetta verður gjørt í skrivi, sum í gjár varð sent politisku flokkunum frá Demokratia og Javnstøðunevndini. Í tíðindaskrivinum verður millum annað sagt, at Javnstøða millum kyn er av grundleggjandi týdningi fyri allari samfelagsmenning, eisini í Føroyum. Royndir higartil vísa tíverri, at Føroyar ikki eru eitt lokkandi samfelag fyri føroyingar uttanlands. Talið á teimum føroyingum, sum velja sítt móðurland frá, veksur í hvørjum, og tað eru serliga kvinnurnar, sum ikki ynskja at liva og virka í okkara samfelagi. Eitt javnari kynsbýti, har politiskar avgerðir verða tiknar, hevði óivað økt um hugin hjá hesum kvinnum at vent heimaftur. Demokratia og Javnstøðunevndin vóna tí, at føroysku kvinnurnar verða væl umboðaðar í nýggja landsstýrinum, bæði landi og fólki at frama.

-ave-

## Óluva Klettskarð fær løn í fýra mánaðir

Hóast Óluva Klettskarð bert sat í starvinum sum landsstýriskvinna í mentamálum í einar tvær vikur. Fær hon løn í fýra mánaðir. Hetta kemst av, at hon var sett í starv 30. august, og sambært lógini um samsýning til landsstýrisfólk, skal hon fáa løn fyri næsta arbeiðsmánaðin við afturvirkandi megi. Tað hevur við sær, at hon fær løn fyri allan septembermánað, samstundis sum hon fær løn í tríggjar mánaðir eftir, hon er farin frá. Hevði hon hinvegin havt fyrsta arbeiðsdag 1. septembur, hevði hon bert fingið sokallaðu bíðilønina, sum er løn í tríggjar mánaðir. Men sum nú er, fær hon løn í fýra mánaðir fyri at arbeiða í góðar 14 dagar.

**Løgmaður:**

# Óvirðilig støða

**Løgmaður ásannar, at Tjóðveldi fekk boðini um uppsøgnina av politiska samstarvinum á ein óvirðiligan hátt og at støðan eisini er óvirðilig fyri løgmansembætið**

POLITIKKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*»Skrivstovumálið« hevur í sett bæði løgmann og Tjóveldi í eina óvirðiliga støðu, viðgongur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

Tað kom ikki bara óvart á almenningin, tá Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fyrradagin frá eini løtu til aðra sleit politiska samstarvið við Tjóðveldi. Eisini landstýrisfólkini hjá Tjóðveldi stóðu sum kánus, tá tey fingu boðini á leið samstundis sum fjølmiðlarnir. Tískil fingu tey heldur onga tíð at umráða seg, áðrenn fjølmiðlarnir komu kropp á kroppi at fregnast eftir teirra viðmerkingum til uppsøgnina.

### Óvirðiligur máti

Løgmaður ásannar, at tjólveldisfólk fingu boðini á ein óvirðiligan hátt og harmast um, at hetta setti tey í eina keðiliga støðu mótvegis almenninginum.

Hinvegin dugir hann illa at síggja, hvussu hann kundi handfarið støðuna øðrvísi.

- Eg sigi ikki, at tey ikki kundu havt fingið boðini ein tíma fyrr. Hinvegin er tað onki óvanligt í, at slíkar uppsøgnir koma brádliga og ikki eru til diskussión. Tað eru treytirnar, politikarar mugu liva við, tá politiski turbulensurin er so stórur, sum hann hevur verið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eisini viðgongur løgmaður at tað er sera óvirðiligt, at tað nú sær út sum at eitt klandur um skrivstovur gjørdi enda á samgonguni.

- Hetta snúði seg í veruleikanum ongantíð um eina skrivstovu. Kjarnin í málinum var, at ivi varð sáddur um mynduleikin hjá landsins hægsta embæti, og tað kann eg, sum løgmaður, ikki liva við, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vil nevniliga framvegis vera við, at varaløgmaður Høgni Hoydal hevur handlað móti boðunum hjá løgmanni, hóast Høgni Hoydal ferð eftir ferð hevur víst hesum aftur.

# Bók um føryskan ungdóm

**Fyrsta veruliga royndin at lýsa føroyskan ungdóm vísundaliga er nú komin út í bók**

NÝGGJ BÓK

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Bókin Miðlar, mentan og seinmodernitetur eftir Firouz Gaini er úrslit av fyrstu vísundaliga kanningini av føroyskum ungdómi. Bókin er ein stytt útgáva av ph.d-ritgerð hjá antropologinum Firouz Gaini. Endamálið við at stytta ritgerðina til bókaútgávu er at gera hana atkomiligari fyri ein breiðan lesaraskara.

### Íkast til kjak

Føroyskur ungdómur hevur ikki áður verið fyrimál hjá fólki, ið granskar føroyska samfelagið. Úrslitini av granskinginí hjá Gaini, sum nú finnast í bókaútgávu, umboða sostatt fyrstu veruligu royndina at ungdómin í landinum vísindaliga. Endamálið við verkætlanini hevur verið at hyggja nærri at ungdóminum í landinum í dag úr einum mannfrøðiligum sjónarhorni.

Føroyskur ungdómur livir í einum opnum, framkomnum og miðlaríkum samfelagi, ið stendur í eini skiftistíð, har kjakast verður um virðir og normar, ið ymiskir samfelagsbólkar knýta seg til.

Ungdómurin í dag livir undir øðrum fortreytum enn foreldraættarliðið gjørdi, og tað er av týdningi, at vit fáa eina dagførda lýsing av hesum samfelagsbólkinum. Fyri at skilja tey ungu (og trupulleikar, tey hava at dragast við) noyðast vit at kanna, hvussu mentan, livikor og familjuviðurskifti teirra eru.

Mentanarligi samleikin hjá ungdóminum er settur saman av lokalum og globalum stílum og siðum, og er hetta nakað, ið eyðkennir seinmodernitetin, ið hevur sett sín dám á føroyska samfelagið síðan umleið 1990. Hetta er ein høvuðshypotesa í ritinum.

Bókin vendir sær til øll, ið hava áhuga fyri ungdómslívi og ungdómsmentan í Føroyum; bæði ung og foreldur, granskarar og lærarar, ráðgevar og námsfrøðingar. Bókin er eitt vísindaligt íkast til kjakið um skúla og læring, frítíð og mentan í Føroyum í dag og í framtíðini.

Tað er forlagið Fróðskapur, sum hevur givið út bókina Miðlar, mentan og seinmodernitetur eftir Firouz Gaini, Ph.D. í mannfrøði.




*Nýggja bókin hjá Firoux Gaini vendir sær til øll, sum hava áhuga fyri føroyskum ungdómslívi*